# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*– Vit eru sera glaðir fyri at hava longt um sáttmálan við Balling, tí hann hevur verið ein av okkara týdningarmestu leikarum í ár.*

*Henrik Tønder, stjóri í Vejle*

HM-Hondbóltur:

## Hmam skal leiða Tunesia til heiðursmerki

**Tunesia er stóri favoritturin í bólki A. Seinast vóru teir líka við at tryggja sær heiðursmerki, og nú ætla teir sær heilt fram millum trý tey bestu**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Undan HM-endaspælinum í hondbólti hjá monnum er sera lítil ivi um, hvørjir av favorittunum hava besta møguleikan at koma víðari úr bólki A. Væntandi er, at Tunesia og Slovenia fara at spæla seg víðari til millumspælið, meðan Kuwait og Grønland neyvan hava nakran møguleika at røkka millumspælið.

### Tunesia skal longur fram

Tunesia er við í HM-endaspælinum í hondbólti hjá monnum fyri sjeyndu ferð á rað. Seinast HM var á skránni í 2005, endaði Tunesia á einum 4. plássi, tá teir taptu bronsudystin við einum máli fyri Fraklandi.

Tunesarnir hingu tó ikki leingi við høvdinum. Nakrar mánaðar eftir tapið í bronsudystinum ognaði Tunesia sær sítt sjeynda afrikanska meistaraheitið við sigri á Egyptalandi, og nú ætlar bosniski venjarin, Sead Hasanefendic, at føra liðið eitt vet longur fram í HM-høpi.

Stóra stjørnan hjá liðnum er Wissem Hmam. Hann gjørdist toppskjútti síðsta endaspæl, og hann er leikarin, sum skal føra Tunesia fram millum tey bestu.

### Slovenia rakt av skaðum

Slovenia er einasta liðið, sum hevur nakrar møguleika at hótta Tunesia í hesum bólkinum. Slovenia hevur fingið nøkur góð úrslit í manshondbólti, og m.a. endaðu teir á øðrum plássi í EM á heimavølli í 2004.

Síðstu árini hevur vild hjá slovenum gingið heilt eftir vild hjá slovenum, og upptaktin til komandi HM hevur heldur ikki verið ov góð.

Spælskiparin og heilin handan liðið, Uros Zormann, verður ikki við orsaka av skaða, og heldur ikki verður væntað, at sterki bakspælarin, Sergej Rutenka, gerst klárur til HM, so Slovenia er nógv viknað í mun til undanfarnar kappingar.




*Hann verður kallaður "tann tunesiski hamarin." Wissem Hmam verður ein av týdningarmestu leikarunum hjá Tunesia í teirra royndum at røkka heiðursmerkjum*

*Mynd: Scanpix*

### Grønland við á triðja sinni

Síðstu tvey londini í bólkinum eru Kuwait og Grønland. Kuwait er við í HM fyri fimtu ferð á rað, men teirra úrslit hava ikki verið so góð. Bert tríggir sigrar er tað blivið til, og tað verður ikki væntað, at teir hava nakran møguleika ímóti Tunesia og Slovenia.

Síðsta landið í bólkinum eru okkara grannar úr Grønlandi. Teir eru við fyri triðju ferð á rað, og bert einaferð hava teir megnað at fingið stig. Flestu grønlendsku leikararnir spæla í donskum hondbólti, og serliga stuttligt verður at fylgja verjuserfrøðinginum, Jacob Larsen, sum leikar við danska toppliðnum, GOG/Svendborg.

**Bólkur A:**
Tunesia
Slovenia
Kuwait
Grønland

HM-Hondbóltur:

## Frakland fer eftir gullinum

**Seinast fekk Frakland bert bronsu í HM-endaspælinum hjá monnum, men nú ætla teir sær meir. Einki annað enn gullið er gott nokk hjá fronsku stjørnunum**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Grannarnir úr Íslandi eru við til at manna bólk B í HM-endaspælinum hjá monnum. Ísland hevur fingið fleiri góð úrslit í manshondbólti, og teir vera væntandi eisini at síggja í millumspælinum hesaferð. Teir fáa tó ringt við at vinna innleiðandi bólkin, har teir eru endaðir saman við Fraklandi, sum er mett at vera helst størsti favoritturin at vinna HM.

### Franskar stjørnur við gullvónum

Frakland hevur vunnið heiðursmerki í fimm av seks teimum seinastu HM-endaspølunum, so tølini tala fyri seg hjá fronsku evropameistarunum.

Aftur hesaferð hava teir eitt ótrúliga gott lið, og venjarin, Claude Onesta, hevur havt hepni við sær í sínum royndum at seta saman eitt lið, mannað av góðum eldri leikarum og ungum evnaríkum leikarum.

Síðsta unga stjørnan í hópinum hjá Onesta er 22 ára gamli bakspælarin, Nikola Karabatic, sum helst er mest lýsandi stjørnan á hondbóltspallinum í dag. Hann verður ein av mest týðandi leikarunum hjá Fraklandi í teirra royndum at vinna HM fyri triðju ferð.




*Olafur Stefansson hevur í nógv ár verið ein av størstu hondbóltsleikarum í heiminum. Aftur í ár verður hann partur av íslendska liðnum*

*Mynd: Scanpix*

### Ísland ætlar sær víðari

Ísland er eitt av liðunum, sum fronsku evropameistararnir eru endaðir í bólki saman við, og hetta er 11. ferðin, at Ísland tekur lut í einum HM-endaspæli í hondbólti.

Teir tryggjaðu sær luttøku til HM eftir ein samlaðan play-off sigur á Svøríki, so longu undan HM hava íslendingar víst, at teir kunnu standa seg millum tey bestu.

Ísland leggur sínar vónir í hendurnar á Olafur Stefansson, sum hevur verið millum heimsins bestu hondbóltsleikarar seinastu nógvu árini. Hann er tó ikki einasti góði leikarin í íslendska hópinum, tí heili átta av leikarunum spæla dagliga í bestu týsku deildini.

### Ukraina og Avstralia

Hetta er bert aðru ferð, at Ukraina er partur av HM-endaspælinum hjá monnum. Teir hava ikki fingið líka góð úrslit sum kvinnurnar, men seinast teir vóru við, endaðu teir á einum flottum 7. plássi. Síðani tá hava teir tó mist størstu stjørnuna, Oleg Velykyy, sum hevur valgt at fáa sær týskan ríkisborgararætt, so hann fer at umboða Týskland í ár.

Síðsta liðið í bólki B er Avstralia. Hetta verður teirra fjórða luttøka í HM-endaspælinum, og ikki verður væntað nakað serligt av teimum. Higartil hava teir bert vunnið ein dyst í HM-høpi.

**Bólkur B:**
Frakland
Ísland
Ukraina
Australia